# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*5. september fingu Súsanna Vang og Jan Møller, Greve, Danmark, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.*

24. september fingu Osla Lydersen, Haraldssund, og Sámal Jákup Høgnesen, Húsar, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

25. september fingu Jóna og Pauli Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3050 gr.

26. september fingu Poula á Líðarenda og Poul Andrias Jacobsen, Gøtu, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2950 gr.

26. september fingu Hjørdis Thomsen og Claus Christensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2900 gr.

27. september fingu Maibritt S. og Rói Egholm, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3380 gr.

28. september fingu Randi Weihe og Óli Johannesen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3900 gr.

1. oktober fingu Marilyn Hansen og Búgvi Poulsen, Gøtugjógv, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2560 gram.

1. oktober fingu Joy og Magni Simonsen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

## Andlát

26. september
Richard Andreasen, Tvøroyri, 53 ár

27. september
Ingolf Sigurðsson,Klaksvík, 81 ár

29. september
Hanna Hansen, Skæling, 81 ár
Andrass Hansen, Sørvágur, 63 ár
Justines Justinussen, Svínoy, 86 ár
Kaj Hansen, sonur Maju og Aksel Hansen ættað av Slættanesi, andaðist á Herlev Hospital, 49 ár

30. september
Mary Debes Olsen, ættað frá Gjógv, búsitandi í Tórshavn, 56 ár
Elsa Maria Hansen, Kollafjørður, 80 ár
Lena Olsen, ættað úr Tjørnuvík, 98 ár

1. oktober
Sigrid Matras á Brekkumørk, Viðareiði ættað úr Vík, 89 ár
Niels Holm Johannesen, vanliga nevndur Homm, ættaður av Argjum, búsitandi í Hvalvík, 42 ár

# Jutt í Svínoy deyður

**Í blaðnum í gjár var onkur misskiljing komin í minningarorðini um Jutt Justinussen. Tí verða tey prentað umaftur í dag:**



*Jutt og Petra Justinussen*

Á mikkjalsmessu andaðist Jutt. Hann varð føddur 24. november 1916 og var sostatt 86 ára gamal. Hann varð ikki kallaður annað enn Jutt, men dópsnavnið var Justinus Michael Fr. Justinussen.

Hann var elsti sonur Anniku úr Yvirstovu og Olivur, bónda Uppi í Húsi í Svínoy. Pápin doyði longu í 1924, tá Jutt var 8 ára gamal, og mamman Annika sat so við festinum, til Jutt kundi festa. Seinni fekk hann eisini Yvirstovufestið eftir mammubeiggjan Sivart, sum var ógiftur og doyði í 1957. Nú hevur Regin, bróðursonur Jutt, bæði festini.

Teir vóru tríggir brøður Uppi í Húsi. Jutt var sum nevnt elstur. Næstelstur var Poul Justinussen, Poul á Fuglberg, sum doyði 1. mai í ár, 84 ára gamal. Poul var giftur við Bettu Højgaard, ættað úr Rituvík og lærarinda í Klaksvík frá 1942 til 1978. Frammanundan hevði hon verið lærarinda í Svínoy í 5 ár. Hon doyði 10. september í ár, 90 ára gomul.

Yngsti bróðirin var Karl, sum doyði í 1972, 52 ár gamal. Hann var giftur við Thurid Lindahl úr Kunoy. Hann var lærari í Svínoy í 23 ár.

Jutt giftist í 1963 við Petru. Stutt var ímillum hjúnini - Petra, sum varð født 4. mai í 1920, doyði 20 desember í fjør. Petra var næstyngst av børnunum hjá Malenu, sum var dóttir Miðlinga-Símun úr Gulaksstovu, og Mikkjal Olsen úti á Bø í Svínoy.

Systkinini hjá Petru vóru Rasmus (í Sjóvinnubankanum), sum var giftur við Juttu á Lava, tey búðu í Havn; Símun búði í Svínoy, hann var giftur við Berlinu Jacobsen av Skála; John var giftur við Berthu, tey búðu í Svínoy; Marin Katrina doyði longu í 1946, hon var gift við Johan Stenberg úr Sumba, og Elsebeth Malena, sum doyði í august mánaði í fjør, var gift við Rósing Rasmussen úr Sørvági, tey búðu á Argjum.

# 25 ára starvsdagur á Tryggingarfelagnum



*1. oktober 2003 hevði Hildebjørg Hjaltalin Ellingsgaard í Havn 25 ára starvsdag á Tryggingarfelagnum Føroyar*

1. oktober 2003 hevði Hildebjørg Hjaltalin Ellingsgaard í Havn 25 ára starvsdag á Tryggingarfelagnum Føroyar

Hildebjørg er úr Havn, foreldrini vóru Kathrina, f. Kjærbæk, ættað úr Sumba, og Dagbjartur Hjaltalin úr Havn.

Hildebjørg fór í læru sum skrivstovufólk á Tryggingarsambandinum Føroyar í 1978, sum 19 ára gomul.

Eftir at hon var útlærd, varð henni bjóðað starv á Tryggingarsambandinum. Hon tók av, og hevur hon verið har síðan, men hon hevur roynt eitt sindur av hvørjum í starvinum hesi 25 árini.

Í sambandi við arbeiði hevur hon tikið nógv ymisk skeið, bæði í Føroyum og uttanlanda.

Hildebjørg var í mong ár álitisfólk á stovninum, og hevur hon eisini sitið í samstarvsnevndini, í fleiri ár var hon bólkaleiðari, men í dag er hon dagligur leiðari á policedeildini.

Hildebjørg er gift við Johannes Ellingsgaard, ættaður av Eiði, tey eiga tríggjar synir, Teitur 19 ár, Bárður 16 ár, og Ari, sum er 11 ára gamal.

Hildebjørg gongur ógvuliga høgt upp í familjuna, tey eru alfa omega hjá henni.

Av frítíðarítrivum kann nevnast at hon bæði teknar og málar, eisini dugur hon væl at skriva yrkingar, fyri ikki at gloyma talur, tá okkurt er á vási í familjuni.

Hon og maðurin elska at spáka úti í náttúrini, eisini ferðast tey nógv bæði innan og uttanlands.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Brynjálvur og Leivur Nattestad 75 ár



*Brynjálvur Nattestad*



*Leivur Nattestad*

Í dag 4. oktober fylla tvíburarnir Brynjálvur og Leivur Nattestad í Miðvági 75 ár. Ter eru burturstaddir føðingardagin.

Brynjálvur er giftur við Ásu, ið er ættað úr Sørvági. Tey eiga tríggjar døtur. Eyð, Jónu og Annibeth.

Leivur er giftur við Marjun úr Miðvági. Tey eiga fimm børn. Birnu, Ann Durutu, Niels og Atla Dáva.

13 ára gamlir mistu teir, brøðurnir, pápan, sum fórst av krígsávum við trolaranum Nýggjabergi.

Hetta helt tó ikki Leivi frá at fara til sjós, og var hann sjómaður fram til 1963, tá han legðist uppi og fór at arbeiða við HVS, sum tað eitur í dag. Tá varð sagt, at hann var rørleggjari. Leivur hevur rikið handil í Miðvági við HSV vørum fram til dagin í dag.

Brynjálvur lærdi til timburmann, og tað arbeiðið hevur hann røkt alt lívið. Í nøkur ár arbeiddi hann í Grønlandi. Hann er framvegis virkin. Eitt nú stóð hann fyri størri arbeiði í samband við umvælingina av Miðvágs Kirkju, sum gjørdist 50 ár í fjør.

Tvíburabrøðurnir hava altíð líkst sum tveir vatndropar, og teir siga sjálvir, at tað eru nógv fólk, teir kendu, farin í grøvina uttan at hava funnið út av, hvør er hvør teirra.

Ein søga, teir plaga at siga frá, er um ein útlendskan tónleikalærara, sum kom í Vágar at undirvísa. Hann búði í barnaheiminum hjá teimum báðum. Tá so okkurt var at taka hond í, komu teir, hvør í sínum lagi, rørsmiðurin og timburmaðurin og gjørdu tað, ið gerast skuldi.

Hesin lærarin kendi eisini Marjun, konu Leivs, men ikki Ásu, konu Brynjálvs. At talan var um tveir mans, og ikki tann sama, sum dugdi alt, visti hann heldur ikki.

So tá hann ein dagin møtti Brynjálvi longri úti í Miðvági og varð boðin inn til ein kaffimunn, sum ein kona, hann ikki kendi, stóð fyri, kom hann púra í neyð. Annað hús. Annar bilur í túninum. Onnur kona í køkinum. Men sami maður.

Tað tók sína tíð, áðrenn hann fekk mannað seg upp at spyrja Leiv, um hann livdi eitt dupultlív við teimum húsum og tveimum konum.




## Gunnar Mohr sølustjóri hjá PM

Gunnar Mohr í Havn er settur sum nýggjur sølustjóri hjá P/F Poul Michelsen. Gunnar er 40 ára gamal og er handilsútbúgvin hjá PM, har hann hevur arbeitt í 23 ár. Seinastu árini hevur hann verið innkeypsleiðari. Hann er eisini partaeigari og nevndarlimur í fyritøkuni.

Gunnar er annars best kendur innan fótbóltin sum HB-leikari og á landsliðnum. Hann hevur í tveimum umførum verið formaður í HB.

Hann er giftur við Osvør Hjalt úr Havn, tey eiga børnini: Onnu Sofíu, Hera og Øssur. Gunnar eigur eisini sonin Jan Hansen.

# Nýggjur posthúsleiðari í Sørvági




*Nýggi leiðarin á posthúsinum í Sørvági, Annelena Vest Niclasen, saman við Noru Weihe, sum nú er farin frá*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Mikudagin 1. oktober var samkoma á Hotel Vágum, tá Annelena Vest Niclasen tók við sum posthúsleiðari í Sørvági, eftir at Nora Weihe, sum hevur fylt 67 ár, fór frá fyri aldur.

Nora Weihe, f. Samuelsen, er úr Sørvagi, hon hevur arbeitt á posthúsinum í Sørvági síðan 1972, og tók hon við sum leiðari 1. august 1988. Hon var gift við Edvin Weihe, bilførara, sum doyði í 1994, 66 ára gamal. Tey fingu sonin Jóan Paula, sum býr í Sørvági.

Annelena Vest Niclasen, f. Joensen, sum nú hevur tikið við sum leiðari, er 35 ára gomul og er úr Hvalvík, hon arbeiddi á posthúsinum í Havn frá 1987-95, tá hon flutti til Sørvágs at búgva. Síðan hevur hon avloyst nógv á posthúsinum í Sørvági. Hon er gift við Jørgen Niclasen, løgtingsmanni og fyrrverandi landsstýrismanni. Tey eiga trý børn, Lindu, Ásvør og Julian.

## Johannes Martin Olsen 70



Ein tann mest braneggjaði politikarin, føroyingar hava havt, fyllir 70 ár í dag. Tað er strandingurin Johannes Martin Olsen.

Hann varð føddur 4. oktober 1933 í Sjóvar Sókn, sonur Jacobinu Jacobsen og Tummas Olsen. Hann er útbúgvin maskinmeistari og hevur starvast sum slíkur, men man vera líka væl kendur sum trúboðari innan heimamissiónina. Hann hevur eisini verið fyristøðumaður á Sjómansheiminum í Runavík.

Mest kendur man Jóhannes Martin vera sum politikari. Tá Jóhan Poulsen á Strondum gavst í politikki í 1970, fekk Sambandsflokkurin aftur tveir tingmenn í Eysturoynni. Jóhannes Martin var annar, Jógvan Ingvard Olsen á Toftum hin. Jóhannes Martin var tingmaður fyri Sambandsflokkin í Eysturoynni í 18 ár út í eitt.

Hann hevur eisini havt sæti á Fólkatingi. Hann hevur verið varamaður í fleiri umførum í tíðarskeiðinum frá 1979 til 1998. Hann var fyrst varamaður fyri Paula Ellefsen og síðani fyri Edmund Joensen. Væl man honum hava dámað niðri, tí hann búsettist í Randers og býr har.

Tá fyrsta royndin varð gjørd at fella Edmund Joensen sum formann í Sambandsflokkinum, meðan hann enn var løgmaður, var Jóhannes Martin Olsen hansara mótvalevni, men á einum rokmiklum fundi í Lærarasúlahøllini var tað Edmund Joensen, sum fekk flestar atkvøður. Síðani hevur Jóhannes Martin ikki gjørt nakran politiskan vørr.

Jóhannes Martin giftist við Borghild Mariu Olsen.

## Dagurin

**4. oktober. Franciscus,** deyður í 1226. Sonur ein keypmann í Assisi í Italiu. Hann stovnaði munkaskipan, sum legði størsta dentin á fátækdømi og gjørdist tann best kenda munkaskipanin. Norðurlanda ápostul Ansgar kom frá franciskanarabrøðrunum. Seinni kom ein nunnuskipan afturat.

Sankta Frants systrarnar í Tórshavn eru av somu skipan. Frans úr Assisi varð skýrdur halgimenni longu í 1228.

Navnið merkir *tann franski.*

**5. oktober. Placidus,** deyður í umleið 550. Tá ið Bænadikt úr Nurcia bygdi kleystrið Monte Cassino, fekk hann jørð at byggja á frá ríkum rómverja, Tertullus at navni. Placidus var sonur henda rómverja og gekk Bænadikti til handa. Kom sjálvur upp í munkaskipanina og eftir boðum Bænadikts bygdi hann eitt kleystur á Sikiloy. Kleystrið varð rænt og lagt í oyði av sjórænarum og Placidus dripin.

*Rasmus Rasmussen deyður hendan dagin í 1962.*

**6. oktober. Broderus.** Ókent halgimenni.